Ekslusiv samrøða

# - Eg hevði verið nóg

**- Nei, eg fari ikki at geva føroyskum politikkarum nøkur góð ráð.**
**- Tað týdningarmesta fyri føroyska samfelagið er, at teir hava ein vilja at menna samfelagið allatíðina, sigur fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Poul Schlüter í eksklusivari samrøðu við Sosialin.**



*- Tað vildi tí verið løgið, um øll oljan gekk uttanfyri føroyskt havøki, sigur fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Poul Schlüter sum er á stuttari Føroya-vitjan í hesum døgum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

POLITIKKUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

- Eg kann bara staðfesta, at tað er hent ótrúliga nógv her í Føroyum.

- Tað er flott. Ja, tað er faktiskt ótrúliga flott, sigur Schlüter, sum í samfull 30 ár varð knýttur at donskum politikki og seinni eisini gjørdi vart við seg sum ES-politikkari.

Sum danskur politikkari og forsætisráðharrin var hann fleiri ferðir á vitjan her á landi, og hevur tí við egnum eygum sæð ta menningina, sum samfelagið hevur verið í tey seinastu nógvu árini.

Í hesum døgum er hann aftur í Føroyum, hesaferð sum gestur hjá Eik Banka, sum í hesum sambandi hevur sett sjóneykuna á íløgur og møguleikarnar hjá føroyingum at gera íløgur í garanterað virðisbrøv.

Fyri Schlüter er eingin ivi um, at stórur framburður er at síggja í føroyska samfelagnum. Og hetta fer eisini at hava sína ávirkan í framtíðini.

- Nógvir útlendskir íleggjarar vilja fegnir koma higar at gera íløgur, sigur hann.

### Fiskivinnan hevur tað gott

Poul Schlüter hevur verið í Føroyum fleiri ferðir áður, áðrenn henda ferðin, nú hann er gestur hjá Eik.

Hóast mong ár eru liðin síðani hann gavst í politikki, og hóast hann verður 78 ára tann 3. apríl í ár, fylgir hann framvegis við tí sum hendir í Føroyum.

Hann er sannførdur um, at tað gongur ótrúliga væl í tí føroyska búskapinum í løtuni.

- Fiskivinnan hevur tað gott, og tað er haraftrat nógvur fiskur at fáa.

- Og so haldi eg tað eisini vera sera áhugavert, at meginparturin av teirri veiðuni, sum verður landað í Føroyum, er fingin uttan fyri føroyska havøkið. "Det er ganske godt", sum hann tekur til.

Tað er kortini ikki bert fiskivinnan, sum hevur hansara áhuga. Hann fylgir somuleiðis væl við í støðuni í føroyska búskapinum.

Og tað er ikki frítt, at fyrrverandi – og higartil einasti! – konservativi forsætisráðharrin er hugtikin av støðuni hjá føroysku peningastovnunum.

### Burtur við almenna stuðlinum

- Tað er ótrúliga gott at síggja, at meginparturin av inntøkuni hjá Eik Banka kemur frá inntøkum í øðrum londum.

- Tað eri eg imponeraður yvir at síggja. Slíkt er gott, sigur Schlüter.

Hann hevur somuleiðis lagt merki til, at tann føroyski búskapurin mennir seg ótrúliga væl.

> *Tá tað gongur so gott við føroyska búskapinum, so freistar tað útlendskar fyritøkur at gera íløgur í Føroyum*

> *Eg haldi tað vera sera áhugavert, at meginparturin av teirri veiðuni, sum verður landað í Føroyum, er fingin uttan fyri føroyska havøkið. "Det er ganske godt*